# Jórunn takkar fyri stuðulin



*Umleið 700 fólk vitjaðu framsýningina hjá Jórunn Dánjalsdóttir í Kommunuskúlanum*

Jórunn Dánjalsdóttir, sum skipaði fyri stóru myndaframsýningini "Realskúlaframsýningin 1916-66" í Kommunuskúlanum í Havn í summar, takkar øllum sum hjálptu so væl til við at lata tilfar og koma við upplýsingum, sum gjørdu at framsýningin eydnaðist so sera væl.

Umleið 700 fólk vitjaðu framsýningina, og nógv av nøvnunum komu eisini upp á pláss, meðan framsýningin var, sigur Jórunn.

Vit her á blaðnum stuðlaðu framsýningini við at seta myndir í blaðið, har nøvn og aðrir upplýsingar mangladu. Í hesum sambandi fara vit at hava ymiskar áhugaverdar myndir í komandi bløðum.

Jórunn sigur, at um onkur ynskir at ogna sær myndir frá framsýningini, ber til at ringja til hana á tel. 316024 ella 226024, ella støkka inn á gólvið í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).



*Her ein øðrvísi uppstilling av næmingum í einum millumskúlaflokki í 1927-28.*
*Ovast f.v.: Kartni Winther og Olivur Dam (Livve), niðast f.v.: Debes Christiansen, Hanus við Høgadalsá og D.P. Danielsen*

*Myndaeigari: Birgit Ørvarodd*
*Myndatakari: Eivind Akraberg Hansen*



*Realskúlanæmingar í 1964. Næmingarnir eru inni í stovuni hjá frk. Cohr í sambandi við at hon fór úr starvi sum lærari.* ***Aftara rað f.v.:*** *Torfinn Hansen (Canada), Kári Davidsen, Dagbjartur Johansen, Annfríði Dam Jacobsen, Kristjan Dahl, Eivind Dalsgarð, Bogi Davidsen, Olaf Johansen og Jógvan Christiansen* ***Fremst f.v.:*** *Herluf Lützen, Allan Brockie, Kristina Abrahamsen (DK), Vigga Cohr-Nielsen (frk. Cohr), Lis Djurhuus (Hammer), og Ása Sørensen (á Mýrini)*

*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*